FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið

Argir, 18. desember 2013

J.Nr.: 090107-018/13-17
(at tilskila í svari)
Tygara skriv:

Viðgjørt: Klik her for at angive tekst.

**Løgtingsmál nr. x/2014: Uppskot til løgtingslóg um at stovna partafelag og at byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um at stovna partafelag og at byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy**

## Kapittul 1
## Stovnan av partafelagi

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at stovna partafelag, hvørs endamál skal vera at gera undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy og hartil hoyrandi vegagerð, hava rakstur av tunlunum um hendur umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemi.

*Stk.* 2. Tunnilin millum Streymoy og Eysturoy verður í hesi lóg nevndur Eysturoyartunnilin. Tunnilin millum Streymoy og Sandoy verður í hesi lóg nevndur Sandoyartunnilin.

*Stk.* 3. Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta navn felagsins, í hesi lóg nevnt "felagið".

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin tekur avgerð um øll viðurskifti, sum eru løgd til partaeigara felagsins at avgera á aðalfundi felagsins.

*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin skal góðkenna starvsskipan fyri nevnd og stjórn felagsins, eins og landsstýrismaðurin skal góðkenna samsýningina til nevnd og stjórn felagsins.

## Kapittul 2
## Ognarviðurskifti

**§ 2.** Partabrøv felagsins eru ogn landsins.

*Stk. 2.* Tað er ikki loyvt felagnum at luttaka í fusión, klovningi ella aðrari yvirtøku av virki, sum hevur við sær, at onnur enn landið gerast eigarar av partabrøvum í felagnum.

Avrit frá kvf.fo

*Stk. 3.* Felagið kann taka lán og ábyrgdarlán við at útskriva lánsbrøv til verkætlanina. Landsstýrismaðurin skal í síni heild góðkenna lánstreytirnar.
*Stk. 4.* Tá samlaða skuldin hjá felagnum er fult afturgoldin, íroknað ábyrgdarlán, verða allar ognir felagsins uttan viðurlag avhendaðar landinum til ognar.

**§ 3.** Felagið fær rætt til vega- og tunnilsgerð og ognarrætt til lidnu tunlarnar við tilhoyrandi vegi.
*Stk. 2.* Landsverk skal undir ábyrgd mótvegis landsstýrismanninum góðkenna tunnilsverkætlanirnar, herundir vega- og tunnilsgerð, áðrenn tunnilsarbeiðini verða sett í verk, og skipar í hesum sambandi fyri eftirliti við, at verkætlanirnar verða framdar samsvarandi góðkendu ætlanunum.

**§ 4.** Landsstýrismanninum er heimilað uttan viðurlag at avhenda til felagið tað anleggsarbeiði, allar forkanningar og annað tilfar, ið Landsverk hevur framleitt í sambandi við hesar verkætlanirnar og aðrar. Slík avhending hevur ikki skattligar avleiðingar við sær fyri felagið.

## Kapittul 3
## Játtan og veðhald

**§ 5.** Játtanin til verkætlanina, stór kr. 400 mió., verður ásett á fíggjarlógini soleiðis:
1) kr. 15 mió. í 2014
2) kr. 5 mió. í 2015
3) kr. 25 mió. í 2016
4) kr. 35 mió. í 2017
5) kr. 35 mió. í 2018
6) kr. 35 mió. í 2019
7) kr. 50 mió. í 2020
8) kr. 50 mió. í 2021
9) kr. 50 mió. í 2022
10) kr. 50 mió. í 2023
11) kr. 50 mió. í 2024

*Stk. 2.* Landsstýrismanninum verður heimilað at veita felagnum rakstrarstuðul, í mesta lagi kr. 10 mió. árliga frá tí árinum, Sandoyartunnilin verður tikin alment í nýtslu.
*Stk. 3.* Felagnum er heimilað at tiltransportera játtan, sum felagið hevur fingið frá landsstýrismanninum og tilsøgn landsstýrismansins um komandi játtan, til ognar og trygdar í sambandi við fígging felagsins av verkætlanunum.
*Stk. 4.* Heimilað verður landsstýrismanninum at hækka partapeningin í felagnum ella at veita felagnum trygd fyri minstu ferðslu til fígging av Sandoyartunlinum.
*Stk. 5.* Hevur felagið ikki javnvág í sínum rakstri, skal landsstýrismaðurin góðkenna støddina á nýtslugjøldunum, sum felagið sambært § 7, stk. 1 hevur heimild at áseta.

## Kapittul 4
## Raðfylgja

**§ 6.** Felagið fer fyrst undir Eysturoyartunnilin.
*Stk. 2.* Fyrireikingarnar í sambandi við Sandoyartunnilin halda fram, og tá ið borað er ígjøgnum í Eysturoyartunlinum, verður farið undir at bora Sandoyartunnilin. Farið verður tó í seinasta lagi undir at bora Sandoyartunnilin í 2018.

## Kapittul 5
## Nýtslugjøld

**§ 7.** Tunnilseigaranum er heimilað at áseta og krevja inn nýtslugjøld frá teimum, ið nýta vega- og tunnilsanleggini.

## Kapittul 6
## Ognartøka

**§ 8.** Landsstýrismaðurin kann ognartaka neyðugt lendi ella tilfar fyri at fremja verkætlanina, um so er, at semja ikki verður fingin við tey, sum hava rættindir yvir lendinum ella tilfarinum.
*Stk. 2.* Ognartøka verður gjørd móti fullum endurgjaldi.
*Stk. 3.* Ognartøka verður framd sambært "lov nr. 69 frá 7. mai 1881 om forpligtigelse til jords afgivelse til offentlige veje, havne og landingssteder samt til offentlige skoler på Færøerne".
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann avhenda tað ognartikna til felagið fyri útveganarkostnað.

**Kapittul 7**
**Skattlig viðurskifti**

**§ 9.** Frá og við árinum, tá tunlarnir verða latnir upp fyri ferðslu, hevur felagið við grundarlagi í útveganarkostnaðinum rætt til skattligar avskrivingar samsvarandi reglunum um vinnuligar bygningar.
*Stk. 2.* Við útveganarkostnaðin skilst tær samlaðu byggiútreiðslurnar til vegir og tunnilsgerð v.m.

**Kapittul 8**
**Vegstøða og linjuføring**

**§ 10.** Eysturoyar- og Sandoyartunnilin eru ikki partar av landsveganetinum sambært løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir við seinni broytingum.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin hevur tó tær heimildir, sum eru ásettar í løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir við seinni broytingum um ferðslu, vegum og tunlum viðvíkjandi.
*Stk. 3.* Skelti- og avmerking skal gerast samsvarandi galdandi kunngerð og ferðsluavmerkingar. Øll skelting og vegavmerking skal góðkennast av ferðslumyndugleikanum og landsvegamyndugleikanum.
*Stk. 4.* Felagið hevur rætt til uttan viðurlag at hava tunlarnar íbundnar í almenna veganetið.
*Stk 5.* Við íbinding í landsvegin skal felagið gera og rinda útreiðslurnar fyri møguliga umlegging av landsveganetinum. Felagið skal rinda fyri íbindingar uttan mun til, um tað er rundkoyring ella onnur íbinding. Um so er, at íbindingin kemur inn í landsveg, verður íbindingin partur av landsvegnum, og ognarrætturin fellur til landsstýrið.

**§ 11.** Eysturoyartunnilin verður lagdur sambært linjuføring norðan fyri Tórshavn við rundkoyring, har annar armurin kemur upp í Runavík og hin á Strondum.
*Stk. 2.* Sandoyartunnilin verður lagdur sambært linjuføring millum Gomlurætt og Traðadal.

**Kapittul 9**
**Eftiransing**

**§ 12.** Felagið hevur rætt til uttan viðurlag at fáa upplýsingar frá Akstovuni um skrásettar eigarar/brúkarar av akførum til tess at ansa eftir gjaldstaðnum.

**Kapittul 10**
**Gildiskoma**

**§ 13.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Avrit frá kvf.fo

**Viðmerkingar til lógaruppskotið**

## Kap. 1: Almennar viðmerkingar

### 1. Endamálið við lógini

Lógaruppskotið er úrslit av semju millum politisku flokkarnar. Endamálið við lógaruppskotinum er at betra undirstøðukervið í Føroyum. Roknað verður við, at tunlarnir fara at fremja flytførið munandi og at stimbra búskaparvøksturin í Føroyum. Tunlarnir fara eisini at binda føroyska samfelagið meira saman.

Valdi leisturin, har ið Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin verða bygdir og riknir av einum tunnilsfelagi, hevur við sær, at fyrst verður farið undir Eysturoyartunnilin, og síðani verður farið undir Sandoyartunnilin. Sambært Landsverki er byggitíðin av hvørjum tunli sær umleið 3 ár, umframt fyrireikingartíð á umleið 2 ár. Eftir verandi tíðarætlan kann verða farið undir at byggja Eysturoyartunnilin í 2016, og koyrandi kann vera í 2018. Tá ið liðugt er at bora ígjøgnum Eysturoyartunnilin, verður farið undir at bora Sandoyartunnilin, og koyrandi kann vera í 2020-21.

Sambært ferðslukanningum, sum eru gjørdar av Rambøll, kann Eysturoyartunnilin verða fíggjaður við nýtslugjøldum. Hinvegin er ósannlíkt, at ferðslan í Sandoyartunlinum verður nóg nógv til, at hesin eisini kann verða fíggjaður við nýtslugjøldum. Ætlanin er tí, at inntøkur frá nýtslugjøldum í Eysturoyartunlinum skulu hjálpa til at fíggja Sandoyartunnilin. Skal hetta bera til, er neyðugt, at Eysturoyartunnilin verður bygdur fyrst, og at væntaðu inntøkurnar frá honum síðani hjálpa til at fíggja byggingina av Sandoyartunlinum.

Ásannast má, at tað verður sera trupult at fíggja byggingina av Sandoyartunlinum næstu árini bara við peningajáttan á fíggjarlógini. Hávast skal í huga, at Sandoyartunnilin eftir øllum ferðslumetingum at døma ikki kannfíggjast á handilsligum grundarlagi við nýtslugjøldum. Tí hevði verið neyðugt við stórari peningajáttan á fíggjarlógini mong ár frameftir fyri at fíggja Sandoyartunnilin. Varisligar útrokningar vísa, at neyðugt er at játta umleið 1 mia. kr. í nútíðarvirði fram til 2034-35 fyri at fíggja tunnilin.

Politisku flokkarnir hava tí valt henda leistin, har ið fyrst verður farið undir ysturoyartunnilin, sum síðani eftir ætlanini kemur at hjálpa til at fíggja byggingina av Sandoyartunlinum.

Loysnin, sum er skotin upp, har ið Eysturoyartunnilin er við til at fíggja Sandoyartunnilin, hevur við sær, at nýtslugjaldið í Eysturoyartunlinum verður nakað hægri sammett við, um Eysturoyartunnilin bara fíggjar seg sjálvan. Hvussu nógv dýrari valdast ferðsluna og sjálvsagt afturgjaldstíð av láninum. Harvið vera ferðslan og samfelagsnyttan úr Eysturoyartunlinum nakað lægri enn annars. Loysnin hevur við sær, at samfelagsnyttan úr Eysturoyartunlinum fyri ein part verður gjørd um til ein Sandoyartunnil.

Samfelagsnyttan úr Eysturoyartunlinum kann sammetast við samfelagsnyttuna úr Kollafjarðartunlinum. Kollafjarðartunnilin er farvegur millum tvey øki í landinum, sum frammanundan eru samanbundin. Tí ber til at siga, at tunnilin í grundini var óneyðugur. Samfelagsnyttan úr Kollafjarðartunlinum er kortini sera stór, við tað at leiðin er høvuðsfarleið í landinum, og at nógv ferðsla brúkar farvegin. Harvið verður nógv tíð vunnin og nógv brennievni spart við Kollafjarðartunlinum.

Á sama hátt vísa ferðslukanningar, at samfelagsnyttan av Eysturoyartunlinum verður sera stór, við tað at talan er um eina høvuðsfarleið í landinum, sum verður nógv brúkt. Við tað at Eysturoyggin og Streymoyggin eru samanbundnar frammanundan, ber eisini til at siga, at Eysturoyartunnilin í grundini er óneyðugur. Men búskaparliga sæð er óviðkomandi, um økini eru samanbundin frammanundan, tá ið samfelagsnyttan er so stór sum í hesum føri. Hetta uttan mun til, um økini eru sambundin frammanundan ella ikki.

## 2. Gongdin higartil

Arbeitt hevur verið við hesum báðum tunlunum í meira enn 10 ár. Einstaklingar tóku seg á heysti 2002 saman í ein bólk við tí endamáli at kanna, um handilsligt grundarlag kundi verið fyri eini tunnilsleið millum Skálafjørðin og Suðurstreymoy. Á Mikkjalsmessu 2005 læt bólkurin frágreiðing úr hondum. Líka síðani hevur verið arbeitt við at byggja og reka Eysturoyartunnilin á privatum grundarlagi.

Talan er um størstu og dýrastu verkætlanir í Føroya søgu. Tað hevur víst seg at vera trupult at fáa fígging til at byggja Eysturoyartunnilin á privatum grundarlagi burturav. Íløgan er í vavi so mikið stór, at hon kann ikki fíggjast á privatum grundarlagi í Føroyum. Neyðugt er tí við útlendskari fígging. Fíggjarkreppan sum byrjaði í 2008, gjørdi tað eisini munandi torførari at fíggja íløgur av hesum slagi, serliga tí at í hesum føri er neyðugt lutvíst at fáa útlendska fígging.

Politiskir myndugleikar og P/F Skálafjarðartunnilin hava samskift javnan um málið. Við heimild í løgtingslóg nr. 53 frá 26. mai 2010 um einkarætt til at byggja, reka og fíggja undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð, varð farið undir at samráðast við P/F Skálafjarðartunnilin um loyvisavtalu (konsesjón), men ongin avtala kom í lag.

Í løtuni bendir einki á, at politisk undirtøka er fyri privatu loysnini, sum Innlendismálaráðið arbeiddi við. Víst hevur eisini verið á ymiskar loysnir í politisku skipanini, har ein møguleiki er, at Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin skulu vera almennir.

Samanumtikið hava ætlanirnar at byggja og reka Eysturoyartunnilin í privatum høpi ikki borið á mál. Politisku flokkarnir hava tí sett sær fyri, at Eysturoyartunnilin skal verða framdur av einum almennum partafelagi, sum eisini fær til uppgávu at byggja og reka Sandoyartunnilin.

## 3. Stutt um verkætlanirnar

### *1. Eysturoyartunnilin*

Eysturoyartunnilin verður nýggj farleið millum Streymoynna og Eysturoynna/Norðuroyggjar. Ferðslukanningar, sum eru gjørdar av Rambøll, vísa, at Eysturoyartunnilin er ein sera lønandi íløga fyri samfelagið sæð frá kostnyttu sjónarmiðum, hóast varisligar metingar verða brúktar um ferðslu, og hóast tað verður tikið hædd fyri váðanum í verkætlanini. Verkætlanin er sambært øllum ferðslukanningum væl før fyri at fíggja seg sjálva við nýtslugjøldum. Samfelagsnyttan stavar serliga frá vunnari tíð, spardum brennievni og minni sliti á bilar.

Eysturoyartunnilin verður ein høvuðsfarleið í landinum og fer at tryggja framkomuleikan og stytta um ferðatíðina á mest nýttu farleiðini í landinum. Umráðandi er, at tað verður tikið hædd

Avrit frá kvf.fo

fyri øllum hugsandi avleiðingum av hesi nýggju farleið, og at mest gagnligu linjuføringar og loysnir verða valdar.

Ætlanin er, at Eysturoyartunnilin verður lagdur eftir tí linjuføring, sum landsmyndugleikar, kommunur og aðrir áhugabólkar higartil hava kunnað tikið undir við. Hetta hevur við sær, at tunnilin verður lagdur sambært linjuføring norðan fyri Tórshavn við rundkoyring, har ið annar armurin kemur upp í Runavík og hin á Strondum.

Væntandi kunnu írestandi jarðfrøðiligar kanningar og aðrar kanningar, sum skulu gerast, áðrenn endalig avgerð verður tikin um at byggja tunnilin, gerast veturin 2013/2014 og summarið 2014.

2. ***Sandoyartunnilin***

Sandoyartunnilin verður nýggj farleið millum Streymoynna og Eysturoynna. M/F Teistin hevur rikið farleiðina millum Gomlurætt og Skopun/Hest síðani 2001. Politisk ynski hava í fleiri ár verið um at gera fast samband til Sandoynna, sum skal avloysa ferjusambandið, sum rekur farleiðina í dag. Teistin røkir sostatt bæði Sandoy og Hest. Ein trupulleiki við at hava somu ferju er, at økt tænastustøði á tí eina plássinum minkar um tænastustøðið á hinum.

Nettojáttanin til ferðjusambandið Gamlarætt – Skopun/Hest er umleið 10 mió. kr.
Talið á akførum við Teistanum er um 50.000 um árið (tølini eru frá 2012). Varisliga mett, kann ferðslan vera umleið 350-400 akfør um samdøgrið, tá ið Sandoyartunnilin letur upp. Eitt tilíkt ferðslulop er ikki óhugsandi, verður hugt eftir mynstrinum í Vágatunlinum, Norðoyatunlinum og í Hvalfjarðatunlinum. Greitt verður eisini frá hesum undir brotinum fígging av verkætlanunum.

**4. Tunnils- og vegagerð í sambandi við verkætlanirnar**

1. ***Eysturoyartunnilin***

Tunnilin verður gjørdur sum eitt vega- og tunnilssamband frá økinum norðan fyri Havnina, sum umvegis eina undirsjóvar rundkoyring býtir seg sundur til økini við ávikavist Strendur og Runavík.

Talan hevur frá byrjan verið um tríggjar ymiskar linjuføringar. Tvær tær fyrstu eru frá økinum norðan fyri Havnina, eystan fyri Sund til økini við ávikavist Strendur og Runavík við sambandi tvørtur um ella undir Skálafjørðin.

Vansin við báðum hesum loysnunum er, at stórur partur av ferðsluni skal tvær ferðir til botns, sum uttan iva er orkukrevjandi og hevur við sær økt $CO_2$-útlát, serliga fyri tungu ferðsluna, sum tvær ferðir skal lyfta seg upp frá botninum.

Triðja loysnin, sum er tann valda linjuføringin, er somuleiðis av Sundi. Undir sjónum, sannlíkt undir Saltnesgrynnuni, verður rundkoyring, har tunnilin greinar seg. Eina greinin kemur upp á Strondum, og hin greinin kemur upp við Runavík. Við hesari linjuføringini er ætlanin hjá landsstýrinum, at ferðslan úr norðurøkinum kemur at koyra eftir vestara armi á Skálafjørðinum. Tí verður gjørdur tunnil millum Skálabotn og Gøtudal/Kambsdal, soleiðis at partur av ferðsluni

Avrit frá kvf.fo

norðaneftir til Havnar fer eftir vestara armi á Skálafjørðinum. Hesin tunnil verður sambært langtíðarløguætlan gjørdur millum 2021-24.

Fyrimunurin við eini rundkoyring er, at tað er ein meira umhvørvisvinarlig loysn, tí tá verða einans 3 portalar í staðin fyri 4, og tess vegna minni inntriv í landslagið og náttúruna. Harafturat verður hjá parti av tungu ferðsluni bara neyðugt at fara til botns eina ferð í staðin fyri tvær ferðir.

Hinvegin hevur Landsverk, sum er tekniski serkunnleikin hjá landsstýrinum og vegamyndugleiki, havt ein ávísan iva um vegamót ella rundkoyring í tunli, og Landsverk hevur tí ikki hildið seg beinleiðis kunna góðkenna rundkoyringina. Tað skal viðmerkjast, at rundkoyring verður roknað sum besta loysn við vegamót. Tí fekk Innlendismálaráðið til vega eina aðra meting ("second opinion") av teimum váðagreiningum, sum felagið P/F Skálafjarðartunnilin hevði gjørt. Hendan metingin heldur, at váðin kann góðtakast. Tá ið umræður trygd og rundkoyringar í tunlum høvdu P/F Skálafjarðartunnilin og Landsverk, sum nevnt, ymisk sjónarmið.

Landsverk fylgir normunum hjá norsku vegamyndugleikunum. Landsverk vísti á, at í Noregi verður loyvi bara givið til rundkoyringar, tá ið einki frægari alternativ er viðvíkjandi trygd, og at rundkoyringar verða ikki nýttar í Norðurlondum annars og í ES. Landsverk mælti tí frá at gera rundkoyring og kundi ikki sum vegamyndugleiki góðkenna eina loysn við rundkoyring við teirri grundgeving, at betri alternativ enn rundkoyring vóru.

P/F Skálafjarðartunnilin hevði norsku ráðgevarafyritøkuna SINTEF at ráðgeva sær. SINTEF gjørdi síðani tvær frágreiðingar til P/F Skálafjarðartunnilin við denti á vandan fyri eldi. Vandin var sera lítil sambært felagnum. Fyritøkan SINTEF tók tó í inngangsorðinum til sína frágreiðing tað fyrivarni, at útrokningar av hesum slagnum vilja byggja á eina røð av fyritreytum og metingum av parametrum, sum eru sera óvissar, og at tølini fyri váða (risiko), sum verða givin í frágreiðingini, tí mugu fatast sum heilt leysligar metingar (rene overslag). Í Samandráttinum legði fyritøkan dent á, at útrokningarnar eru heftar við stórari óvissu, og at úrslitini av váðagreiningini ikki mugu takast sum eksakt virði.

Undir hesum fyrivarni kom SINTEF í greiningunum til, at við lítlari ferðslu er váðin heilt greitt undir tað krav til váða, sum kann góðtakast sum mestamark. Eisini við nógvari ferðslu er váðin niðan fyri hetta mark. Nevnda mestakrav til váða er hitt sama, sum í 2003 varð nýtt til váðagreiningina av Norðoyatunlinum.

Tásitandi landsstýriskvinna í innlendismálum tók undir við at føra linjuna á tunlinum umvegis eina rundkoyring undir botni, og landsstýrið, sum situr nú, tekur eisini undir við tí. Fyri at ivi ikki skuldi vera um trygdina við teirri loysnini, fekk Innlendismálaráðið ráðgevarafyritøkuna Rambøll at ganga ígjøgnum frágreiðingarnar frá SINTEF fyri at meta um tær og at gera eina sonevnda "second opinion".

Verkfrøðingarnir hjá Rambøll komu til, at SINTEF-frágreiðingarnar, hóast manglar, eru væl skjalprógvaðar og greiddar úr hondum, soleiðis sum vanligt er í slíkum arbeiði. Rambøll hava nýtt samsvarandi arbeiðshátt, tá teir hava skjalprógvað váðastigið í Oyrasundstunlinum og øðrum stórum tunlum. Váðin við loysnunum, sum kannaðar eru, er á slíkum stigi, sum verður góðtikið og er ikki størri enn í øðrum tunlum í Europa, sum kunnu samanberast við hesar

loysnirnar. Eisini loysnin við rundkoyring er á einum stigi, sum kann góðtakast, og Rambøll vísti á, at rundkoyringar verða nýttar í tunlum aðra staðni í Europa, t.d. Finnfast í Noregi, har Rambøll hevur gjørt bruna- og váðagreiningar.

2. ***Sandoyartunnilin***

Ætlanin er at gera Sandoyartunnilin eftir tí leisti, sum Landsverk hevur mælt til. Loysnin fevnir um tunnil frá Gomlurætt til Traðadal.

Á hesi linjuni fer vegurin at halda fram á Gomlurætt umleið 200 metrar beint fram frá har, ið 180 stig sneiðingin er í dag. Her kemur tí at vera eitt líknandi berg, sum er við Gomlurætt í dag. Orsøkin til, at hildið verður fram 200 metrar longur fram, er, at ætlanin er at gera íbinding oman á Gomlurætt, har ið sneiðingin er í dag. Íbindingin má vera umleið 200 metrar frá tunnilsmunnanum; tí má tunnilin flytast longur inn í bergið.

Hallið í tunlinum frá Gomlurætt verður umleið 5,5%. Markið fyri, nær eyka breyt eigur at vera, er 5%, men Landsverk metir, at her ber til at gera undantak og harvið gera tunnilin sum vanligan tvíbreytaðan tunnil. Á hesum strekkinum eru eisini minni enn 50 metrar av tilfari oman fyri tunnilin. Hetta metir Landsverk heldur ikki vera ein trupulleika, tí jarðfrøðin er rímiliga væl kend her, og her verður ikki roknað við at koma í nakað ókent tilfar.

Verður ynskt at hava 50 metrar av yvirhædd allan vegin, kann hetta gerast við at hava hallið á vegnum umleið 6,5%. Tá hevði verið neyðugt at gera tríggjar breytir ein part av tunlinum. Brekkan niðan móti Traðadali verður ikki serliga brøtt, tí her er hallið umleið 4,5%, og vit klára eisini at halda markið á 50 metrar av tilfari oman fyri tunnilin.

Tunnilin kemur upp í Traðadali, ið er dalurin, sum vendir móti Sands bygd, og vit eru tí komin fram við hægsta punktinum millum Skopun og Sand. Frá munnanum vera umleið 400 metrar yvir til verandi landsveg, har til ber at gera rundkoyring við íbindingum til tunnilin, Skopunar og Sands.

<u>Kostnaðarmeting:</u>

| | |
|---|---|
| 300 m. av vegi at rætta upp á 5.000 kr./m. | 1,5 mió. kr. |
| 200 m. av vegi gjøgnum vánaligt lendi á 20.000 kr./m. | 4,0 mió. kr. |
| 10.600 m. av tvísporaðum undirsjóvartunli á 80.000 kr./m. | 848 mió. kr. |
| 400 m. av vegi gjøgnum vanligt lendi á 15.000 kr./m. | 6 mió. kr. |
| Rundkoyring | 4 mió. kr. |
| *Tilsamans* | *863,5 mió. kr.* |

## 5. Aðrar vegagerðir

Peningur er settur av til innkoyringarveg til Havnina í 2014 og í langtíðarløguætlanini frá 2019. Sambært langtíðarløguætlanini í játtanarkørmunum er sett av at gera vegin oman fyri Skálafjørð frá 2018. Av størri tunlum fer Viðareiðistunnilin í gongd í ár, og Hvalbiartunnilin er tann næsti, sum sambært játtanarkørmunum skal byrja í 2018. Sambært kørmunum er sett av at byrja tunlarnar Norður um Fjall og Gøtudal/Kambsdal til Skálafjørð í 2021.

Avrit frá kvf.fo

Endamálið við tunnlinum Gøtudal/Kambsdal til Skálafjørð er at stytta farleiðina, koyra ferðsluna uttan um Gøtueiði, sum liggur høgt, og minka ferðsluna gjøgnum bygda økið við Gøtugjógv. Tunnilin fer eisini at leiða ferðsluna, sum fer úr Norðuroyggjum til Tórshavn, eftir vestara armi á Skálafjørðinum, har ið veganetið er betri útbygt, umframt at minni er av bygdum øki á tí leiðini, og talan er um ein lágtliggjandi farveg.

## 6. Fígging av verkætlanunum

Í lógaruppskotinum er møguleiki veittur fyri ymiskum trygdum fyri fígging. Fíggingin av verkætlanini er fyrst 400 mió. kr. í almennum partapeningi á fíggjarlógunum komandi árini fram til 2024. Harnæst kann verða veitt felagnum rakstrarstuðul upp til 10 mió.kr. um árið til rakstur av Sandoyartunlinum. Harumframt skal felagið taka upp lán - hetta kann bæði vera sum vanlig bankafígging, lánsbrøv og ábyrgdarlán. Sum síðsta trygd kann landsstýrið hækka partapeningin ella veita trygd fyri minstu ferðslu fyri at fíggja verkætlanina Sandoyartunnilin.

Møguleikarnir fyri lánsfígging til lagaligar treytir eru í stóran mun tengdir at spurninginum, um lánveitarar hava álit á, at komandi rakstrarinntøkur kunnu svara rentur og avdráttir av lánunum.

Fíggingin verður í tveimum pørtum. Lutvíst er neyðugt við einari byggifígging og lutvíst endaligari fígging. Byggifíggingin er m.a. neyðug av tí, at tær 400 mió. kr., sum landið setir í felagið, bert lutvíst verða tøkar undir byggingini.

Enn hava ongar realitetssamráðingar verið um lánsfígging og um, hvørjar treytir skulu vera, harundir avdráttartíð, rentur og treytir annars.

Eisini er møguleiki fyri, at tann fíggingarstovnur, sum veitir endaliga fígging, bert veitir hesa, tá ið verkætlanirnar eru lidnar. Tá má byggifígging til, har tann byggifíggjandi fær transport í teimum endaligu tilsøgnunum og í rakstrarinntøkum hjá felagnum seinni ár.

Peningurin, sum landið setir í felagið, verður játtaður yvir 11 fíggjarár við 15 mió. kr. í 2014 og 5 mió. kr. í 2015, 25 mió. kr. í 2016, 35 mió. kr. árliga frá 2017 til 2019 og 50 mió. kr. árliga frá 2020 til 2024.

Ognartøkuheimild er sett í §8 í lógaruppskotinum, tí í løtuni er ivasamt, um neyðug heimild er í nakrari løgtingslóg til ognartøku av lendi til slíkt endamál sum hesar báðar tunnilsverkætlanirnar.

Viðvíkjandi veðseting av vegi og tunnilsmunna verður hetta eftir vanligu reglunum um veðseting av fastari ogn.

Ferðafólkatal og nýtslugjald eru grundleggandi fyritreytir fyri inntøkugrundarlagnum hjá felagnum. Ferðslukanningar hjá Rambøll eru nýttar sum grundarlag at meta um ferðsluna í Eysturoyartunlinum.

Viðvíkjandi Sandoyartunlinum er mett um ferðsluna við grundarlagi í verandi ferðslu við ferjusambandinum um Skopunarfjørð umframt einum mettum ferðslulopi. Árliga talið á akførum, sum sigla við Teistanum, er um 50.000 (2012), og mett verður varisliga, at tá ið

Avrit frá FVR

Sandoyartunnilin letur upp, kann ferðslan vera 350-400 akfør um samdøgrið (báðar vegir). Roknað verður sostatt við, at inntøkurnar frá nýtslugjøldum verða nakað hægri, av tí at eitt ávíst ferðslulop verður, tá ið tunnilin letur upp, og við tað, at ferðafólk hava ein øktan gjaldsvilja svarandi til virðið á bíðitíð og ampum, tey sleppa undan. Í løtuni verður roknað við, at Sandoyartunnilin fær umleið 12 mió. kr. árliga í inntøkum.

Roknast kann við, at eitt ferðslulop verður í báðum tunlunum, soleiðis at inntøkurnar ikki koma upp á væntaða støði fyrr enn 2-3 ár eftir, at tunlarnir lata upp fyri ferðslu. Hetta er grundað á royndir úr Vágatunlinum, Norðoyatunlinum og Hvalfjarðartunlinum í Íslandi. Royndirnar úr Vágatunlinum og Norðoyatunlinum vóru, at talið á akførum er vaksið 5-7 ferðir, verður sammett við ferjusambondini, sum vóru frammanundan. Tað tók millum trý og fimm ár, áðrenn ferðslan javnaði seg á einum nýggjum støði. Ferðslulopið, sum kom av fasta sambandinum, varði sostatt millum trý og fimm ár. Nakað tað sama var galdandi í Hvalfjarðartunlinum. Mett hevur verið um útreiðslurnar av rakstrinum við grundarlagi í rakstrinum av Vága- og Norðoyatunlinum. Roknað verður við rakstrarútreiðslum á umleið 15 mió. kr. árliga í Eysturoyartunlinum og umleið 12 mió. kr. í Sandoyartunlinum, íroknað fyrisiting og rakstur av gjaldskipan. Afturat hesum kann væntast, at neyðugt verður at seta av ávísa upphædd árliga til størri fløgur, sum vera við ávísum millumbilum í tunlunum.

## 7. Ábyrgdarpeningur

Felagnum verður heimilað at taka ábyrgdarlán. Tað verður hildið skilagott, at felagið hevur so nógvar møguleikar sum gjørligt at taka ymisk sløg av fremmandafígging, harundir vanliga lánsfígging og ábyrgdarlán.

Hugsanin er, at felagið sjálvt skipar sína lántøku, soleiðis at hon verður fingin til vega á bíligasta og tryggasta hátt. Ábyrgdarlán verður bara upptikið, um tað loysir seg fíggjarliga og er ein fyrimundur fyri samlaðu fíggingina. Væntast kann, at ábyrgdarlánini hava hægri rentu sammett við aðra fremmandafígging, til dømis vanliga lánsfígging, men kann viðvirka til lægri rentu av lánsfígging. Orsøkin til hægri rentu á ábyrgdarlánum er, at fer eitt tílíkt felag á húsagang, standa krøvini frá kreditorum, ið hava givið ábyrgdarlán, aftaná krøvini frá kreditorum, ið hava veitt aðra lánsfígging.

Tað kann blíva avbjóðandi hjá felagnum at fáa fíggingina til vega. Fíggjarmálaráðið heldur tað tí vera skilagott, at felagið hevur møguleikan at upptaka ymisk sløg av lánum, skuldi hetta verið neyðugt fyri at fáa samlaðu fíggingina til vega.

Orsøkin til at tað kann verða avbjóðandi hjá hesum felagnum at fáa fígging til verkætlanirnar er, at felagið at byrja við og fyrstu nógvu árini hevur lítlan eginpening sammett við fløgurnar, sum skulu gerast, og sammett við ta lánsfígging, sum verður neyðug at upptaka.

Eginpeningurin verður játtaður líðandi yvir 11 fíggjarár. Felagið hevur tí lítlan eginpening at standa ímóti við fyrstu nógvu árini. Í útgangsstøðu kann eitt tílíkt felag fara á húsagang, hóast hetta ikki er sannlíkt. Møguligir lánveitarar eru eisini greiðir yvir, at felagið kann fara á húsagang, um illa veit við. Harafturat hevur tað týdning, at onnur verkætlanin, sum felagið fer undir, ikki ber seg eina við ferðslugjaldi.

**Kap 2: Avleiðingar av uppskotinum**

**1. Fíggjarligar avleiðingar**

*1. Íløgukostnaður*

Við støði í royndum frá tunlum, sum áður eru bygdir í Føroyum, metir Landsverk, at Eysturoyartunnilin kostar á leið 1 mia. kr. Kostnaðarmetingin fyri Sandoyartunnilin er 865 mió. kr., sí omanfyri undir um Sandoyartunnilin. Byggirentur, sum skulu rindast í byggitíðarskeiðinum, eru ikki íroknaðar í kostnaðarmetingunum omanfyri.

*2. Rakstrarkostnaður*

Rakstrarkostnaðurin av Eysturoyartunlinum er varisliga mettur til umleið 15 mió. kr. Rakstrarkostnaðurin av Sandoyartunlinum er varisliga mettur til umleið 12 mió. kr. Tølini eru við núverandi prísstøði og íroknað fyrisiting og rakstur av gjaldskipan.

*3. Avleiðingar fyri landið*

Landið setur 400 mió. kr. í felagið beinleiðis av fíggarlógini fram til 2024. Harafturat fær landsstýrismaðurin heimild at veita felagnum rakstrarstuðul upp til 10 mió. kr. árliga frá tí árinum, Sandoyartunnilin verður tikin alment í nýtslu. Í lógini er eisini heimilað landsstýrismanninum at veita felagnum trygd fyri minstu ferðslu ella at hækka partapeningin í felagnum. Hartil koma møguligar avleiddar vegagerðir, sum kunnu kosta nakrar 100 mió. kr., alt eftir hvat verður tikið við.

*4. Avleiðingar fyri kommunurnar*

Uppskotið verður ikki mett at hava fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

*5. Avleiðingar fyri vinnuna*

Uppskotið verður mett at hava jaligar avleiðingar fyri vinnulívið. Uppskotið verður ikki mett at hava fyrisitingarligar avleiðingar fyri vinnulívið.

*6. Umhvørvisavleiðingar*

Uppskotið hevur við sær umhvørvisligar avleiðingar, til dømis við Toftavatn. Sama er galdandi í Traðadali. Neyðugt er at hava atlit at hesum báðum økjunum, áðrenn farið verður undir verkætlanirnar fyri at minka um avleiðingarnar fyri umhvørvið.

Ætlaða linjuføringin viðvíkjandi Eysturoyartunlinum er ikki langt frá Toftavatni, ið er eitt ógvuliga serstakt náttúruøki við nógvum fjølbroyttum djóra-, plantu- og fuglalívi. Fjølbroytta djóralívið og serliga fuglalívið hevur stóran týdning fyri økið. Tí er Toftavatn og økið har serliga viðbrekið, og hetta eiga serlig atlit at verða tikin at.

Í byggitíðini verður neyðugt við tiltøkum til tess at fyribyrgja dálking av strondum og áum v.m. Tá ið umræður tilfar frá boringini, verður eisini neyðugt at verja økið. Boring, spreinging og lastbilaferðsla kunnu verða til bága fyri fugla- og djóralívið, og tí eigur arbeiðið at verða skipað

Avrit frá kvf.fo

soleiðis, at tað er til minst møguligan ampa. Tað er tó neyvan fíggjarliga sannlíkt, at tað fer at bera til at tíðaravmarka arbeiðið.

Økt ferðsla í økinum hevur við sær óljóð og lufidálking, tó mest í meldurtíðini og í góðum veðri, tá ið stilli er.

*7. Serligar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum*

Royndir, bæði úr útlondum og her heima vísa, at ein tunnil skapar aktivitet í økjum, har hann liggur. Við økingini í ferðsluni, ið verður millum Eysturoy og Streymoy, má tað sama metast at fara at vera galdandi í hesum føri. Tað sama fer væntandi at gera seg galdandi viðvíkjandi Sandoyartunlinum.

Uppskotið verður ikki mett at hava serligar umsitingarligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

*8. Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir*

Uppskotið verður ikki mett at hava sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

*9. Hava millumtjóða sáttmálar við sær fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella vinnuna?*

Uppskotið verður ikki mett at hava fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar, tá ið umræður altjóða avtalur og reglur.

*10. Um uppskotið áleggur fólki skyldur t.d. upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi, skal verða greitt frá umsitingarligu avleiðingunum av hesum*

Uppskotið verður ikki mett at áleggja fólki skyldur ella hava fyrisitingarligar avleiðingar við sær fyri vanliga borgaran.

*11. Um heimildir verða lagdar til annan landsstýrismann, ella til kommunur útyvir kommunustýrislógina, skal greiðast frá teimum fyrilitum, ið grundgeva hetta*

Uppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann ella kommunur.

*12. Fáa almennir myndugleikar atgongd til privata ogn, skal grundgevast fyri hesum og greiðast frá vavinum av heimildini*

Sambært uppskotinum hevur landsstýrismaðurin tær heimildir, sum eru ásettar í landsvegalógini, sbr. viðmerkingarnar til §10.

Avrit frá kvf.fo

*13. Talva við yvirliti yvir avleiðingar*

| | Fyri landið/ Landsmyndug-leikar | Fyri kommu-nalar myndug-leikar | Fyri pláss/ øki í landi-num | Fyri ávísar samfelags-bólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | **Ja** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Ja** |
| **Umsitingarligar avleiðingar** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** |
| **Umhvørvisligar avleiðingar** | **Nei** | **Ja** | **Ja** | **Nei** | **Nei** |
| **Avleiðingar í sambandi við altjóða reglur og avtalur** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** |
| **Sosialar avleiðingar** | - | - | **Nei** | - | - |

Avrit frá kvf.fo

## Kap. 3. Serligar viðmerkingar

### Til § 1

*Stk. 1.* Skotið verður upp at stovna partafelag, og ásett verður, hvat endamál felagsins skal vera. Við at áseta í løgtingslóg, hvat endamálsorðingin hjá felagnum skal vera, kann partaeigarin ikki broyta viðtøkurnar, sum hann annars hevði havt rætt til. Á henda hátt verður tryggjað, at felagið bert verður nýtt til tað endamál, tað er stovnað til.

Ætlanin er, at felagið skal standa fyri gerð av tunlunum og tilkoyringarvegum til sjálvar tunnilsmunnarnar. Hinvegin er ikki ætlanin, at felagið skal hava ábyrgdina av møguligum avleiddum vegagerðum longri burtur frá tunlunum. Hesum arbeiði er ætlanin, at Landsverk skal standa fyri. Í verklagslógini verður nærri lýst, hvørjum pørtum av vegagerðini partafelagið skal standa fyri, og hvørji vegagerð, ið landið skal standa fyri.

*Stk. 2.* Við tí endamáli at lætta um orðingarnar í uppskotinum, verða tunlarnir í hesum uppskoti nevndir Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta navn felagsins. Tí verður felagið, hvørs endamál skal vera at gera Eysturoyar- og Sandoyartunnilin, í hesum uppskoti umrøtt sum "felagið".

*Stk. 4.* Talan er um eitt partafelag sum verður sett á stovn av Føroya Landsstýri. Við stovnanini verður Føroya Landsstýri einasti partaeigari felagsins. Reglurnar í galdandi partafelagslóg, løgtingslóg nr. 73 frá 31 mai 2011 um parta- og smápartafeløg, verða í síni heild galdandi fyri felagið. Felagið er fevnt av ásetingum í partafelagslógini, sum eru galdandi fyri landspartafeløg. Felagið skal hava ein leiðslubygnað, sum er fyriskrivaður í § 111, litra 1) í partafelagslógini.

Landsstýrismaðurin velur eina nevnd, sum síðani setur ein stjóra. Stjórin skal við ábyrgd mótvegis nevnd felagsins standa fyri dagligu leiðsluni av felagnum. Landsstýrismaðurin skal taka avgerð í øllum týðandi málum, sum sambært ásetingunum í partafelagslógini skulu leggjast fyri aðalfund, til dømis val av nevnd, val av grannskoðara, broyting í viðtøkum felagsins og avgerð um møguligt vinningsbýti.

*Stk.5.* Sambært ásetingunum í § 130 í partafelagslógini skal nevnd felagsins gera eina starvsskipan fyri virksemi nevndarinnar. Starvsskipanin skal hava nærri ásetingar um uppgávur nevndarinnar, harundir reglur um m.a. konstitusjón, arbeiðsbýti, eftirlit við dagligu leiðslu felagsins, førslu av bókum og gerðabókum, skrivligar og elektróniskar fundir, tagnarskyldu, varalimir, roknskapareftirlit, undirskriving av grannskoðanarprotokoll og tryggjan av, at neyðuga grundarlagið fyri grannskoðan er tøkt. Sambært § 130, stk. 3 í partafelagslógini skal starvsskipanin hjá landspartafeløgum almannakunngerast í kt-skipan Skráseting Føroya. Uppskotið ásetur, at landsstýrismaðurin skal góðkenna starvsskipanina fyri felagið. Henda áseting eigur at verða tikin við í viðtøkur felagsins.

Sambært §§ 138 og 139 í partafelagslógini eru ymiskar ásetingar um samsýning til limir í leiðslu felagsins. Sambært § 138 í partafelagslógini kunnu limir í leiðsluni verða løntir við føstum ella skiftandi viðurgjaldi. Viðurgjaldið má ikki vera hægri enn tað, sum mett verður vanligt í mun til slag og vavi av arbeiðinum, umframt tað, ið mett verður ráðiligt í mun til

Avrit frá kvf.fo

fíggjarligu støðu kapitalfelagsins. Uppskotið ásetur, at landsstýrismaðurin skal góðkenna samsýningina til nevndarlimir felagsins og eisini samsýningina til stjórnina. Samsýningin til nevnd felagsins krevur sambært uppskotinum serstaka góðkenning frá landsstýrismanninum.

Uppskotið ásetur somuleiðis, at landsstýrismaðurin skal góðkenna samsýningina til dagligu leiðslu felagsins. Tað verður upp til nevndina at áseta reglur um setanartreytir, men sjálv samsýningin til leiðsluna skal hava serstaka góðkenning frá landsstýrismanninum. Treytin um góðkenning av nevndu samsýningum er sostatt ikki lokin við, at landsstýrismaðurin sum kapitaleigari á aðalfundi felagsins góðtekur ársfrásøgn felagsins. Hesar ásetingar eiga at verða tiknar við í viðtøkur felagsins.

**Til § 2**

*Stk. 1 og stk. 2.* Her verður staðfest, at partapeningurin altíð skal vera ogn landsins, og at aðrir eigarar heldur ikki á annan hátt, til dømis við samanlegging v.m., kunnu blíva eigarar av partapeninginum í felagnum. Ásetingin í stk. 2 er hinvegin ikki til hindurs fyri, at felagið kann verða lagt saman við øðrum feløgum, sum landskassin einsamallur eigur.

*Stk. 3.* Lagt verður til grund, at felagið kann útvega sær fígging til verkætlanirnar við at upptaka vanligt lán frá fíggingarstovnum við veð í tunlum við innleggingum v.m., og verður tá neyðuga lendið tilmatrikulerað felagnum sum ogn og kann tæna sum veðseting fyri fíggingina.

Harumframt gevur ásetingin í lógini heimild til felagið at taka upp ábyrgdarlán við at útskriva lánsbrøv, sum privat, fyritøkur og institutionellir íleggjarar kunnu keypa. Lánsbrøvini kunnu útformast soleiðis, at hesi hava eina minstu rentu og eina størstu rentu, soleiðis at rentan verður ásett eftir objektivum kriterium í mun til gongdina í felagnum.

Fyri at skapa áhuga fyri lánsbrøvunum verður mælt til, at nevndin í felagnum umhugsar at geva lánsbrævaeigarunum atgongd til aðalfundir í felagnum og har seta fram spurningar og gera viðmerkingar til viðurskifti felagsins, eins og viðtøkurnar kunnu hava ásetingar um, at eigarar av lánsbrøvum hava rætt til at velja t.d. ein nevndarlim í felagið, soleiðis at lánsbrævaeigararnir á henda hátt hava innlit í og ávirkan á gongdina í felagnum, sí tó § 1, stk. 4, har tað er ásett, at landsstýrismaðurin skal góðkenna starvsskipanina fyri nevnd felagsins.

Í sambandi við sølu av slíkum lánsbrøvum verður neyðugt at gera prospekt, har lánsbrøvini við nágreiniligum treytum verða upplýst, eins og nevndin í felagnum má meta um, í hvønn mun lánsbrøvini skulu vera skrásett á einum keypsskála.

Allar treytirnar, sum verða galdandi fyri lánsbrøvini, skula góðkennast av landsstýrismanninum.

*Stk. 5.* Her verða ásettar heimildir fyri og skyldu til leiðslu felagsins at avhenda allar ognir hjá felagnum til landsstýrið til ognar uttan kostnað, ið merkir, at felagið tá verður avtikið og strikað hjá Skráseting Føroya.

**Til § 3**

*Stk. 1.* Her verður rætturin hjá felagnum staðfestur at gera Eysturoyar- og Sandoyartunnilin. Eisini verður ognarrætturin hjá felagnum til tunlarnar staðfestur.

*Stk. 2.* Tað verður mett at vera neyðugt, at Landsverk góðkennir samlaðu verkætlanirnar, áðrenn arbeiðið byrjar, millum annað fyri at tryggja sær, at teir normar og standardir, ið eru galdandi á økinum, verða hildnir. Ætlanin er, at Landsverk eftir hvørja fasu í prosjekteringunum fær tilfarið frá partafelagnum til viðmerkingar og skal harafturat vegna landsstýrismannin góðkenna endaligu prosjektini. Eisini er ætlanin, at Landsverk skal hava eftirlit við, at verkætlanirnar verða framdar samsvarandi góðkendu prosjektunum.

**Til § 4**

Her verður staðfest, at felagið kostnaðarfritt fær tað tilfar, sum Landsverk hevur framleitt í sambandi við verkætlanirnar, uttan at hetta fær skattligar avleiðingar fyri felagið. Heimildin fevnir eisini um tilfar, sum Landsverk hevur framleitt til aðrar líknandi verkætlanir, harundir Vága- og Norðoyatunnilin.

Felagið kann eisini keypa forkanningar og annað tilfar, ið privat feløg hava framleitt ella eiga, og sum viðkoma verkætlanunum.

**Til § 5**

*Stk. 1.* Her verður samlaða játtanin til felagið ásett í sambandi við verkætlanina, ið kemur at merkja, at felagsins partapeningur verður hækkaður við árligu játtanini, soleiðis at samlaði partapeningurin í 2024 verður kr. 400 mió.

*Stk. 2.* Stk. 2. er ætlað sum ein standandi heimild hjá landsstýrismanninum eftir umsókn at veita felagnum rakstrarstuðul upp til kr. 10 mió. árliga, men ikki fyrr enn Sandoyartunnilin alment verður tikin í nýtslu.

Hendan upphædd svarar á leið til tað, sum Sandoyarleiðin sjóvegis hevur í halli í løtuni.

*Stk. 3.* heimilar felagnum sum trygd fyri vanligu fíggingini av verkætlanini at tiltransportera tær játtanir, sum givnar verða sambært stk. 1 og stk. 2 til fíggjarstovnar, t.v.s. sum trygd fyri byggilán og endalig lán.

*Stk. 4.* Her verður ásett, at landsstýrismaðurin kann seta nýggjan partapening í felagið ella veita felagnum trygd fyri einari minstu ferðslu til fígging av Sandoyartunlinum. Hetta merkir, at nevnd felagsins skal leggja eina fíggjarætlan, sum týðuliga vísir, hvussu og í hvønn mun felagið er ført fyri sjálvt at afturrinda kostnaðin av tunlunum, men at landsstýrismaðurin á hendan hátt hevur heimild at veita trygd fyri einari inntøku til felagið, sum byggir á eitt mett ferðslutal, soleiðis at skilja, at um so er, at ferðslan er minni, skal landsstýrismaðurin stuðla felagnum við eini upphædd svarandi til munin í metta ferðslutalinum og ásannaða ferðslutalinum.

Avrit frá kvf.fo

Ásetingin inniber eisini, at nevnd felagsins hevur skyldu í sambandi við tilrættisleggingina av fíggingini nágreiniliga at kanna og útgreina samspælið millum kostnað fyri at ferðast gjøgnum tunlarnar í mun til metta ferðslutalið.

*Stk. 5.* Ásett verður, at landsstýrismaðurin skal góðkenna støddina av nýtslugjøldunum, um so er, at felagið ikki hevur javnvág á sínum rakstri, og hongur henda áseting saman við ásetingini í stk. 4, soleiðis at nevndin ikki einsamøll kann áseta eitt ov lágt gjald til tess at økja um stuðulin sambært stk. 4.

Landsstýrismaðurin kann tí á henda hátt hava ávirkan á, hvussu fíggjarligi stuðulin hjá landinum kann verða latin felagnum.

**Til § 6**

*Stk. 1.* Uppskotið fevnir um gerð av tveimum undirsjóvartunlum, Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin. Her verður ásett, at felagið fyrst fer undir at gera Eysturoyartunnilin.

*Stk. 2.* Felagið skal halda á fram við fyrireikingunum til Sandoyartunnilin, ímeðan felagið ger Eysturoyartunnilin. Tað er ábyrgd felagsins at tryggja, at fyrireikingarnar eru lidnar, tá farast skal undir boringar av Sandoyartunlinum.

Felagið skal fara undir at bora Sandoyartunnilin, tá borað er ígjøgnum í Eysturoyartunlinum. Hetta merkir, tá sjálvt boriarbeiðið er liðugt. Tað er sostatt ikki ein treyt, at Eysturoyartunnilin skal vera tikin alment í nýtslu. Ultimo 2018 er evsta mark fyri, nær farið skal vera undir at bora Sandoyartunnilin.

**Til § 7**

Endamálið við at áseta og krevja inn nýtslugjøld er, at brúkarin skal vera við til at fíggja størri verkætlanir, sum tað hevði verið torført at fíggja við almennum peningi burturav.

Ætlanin er, at nýtslugjøldini skulu fíggja bæði afturgjaldingina av lánunum til byggingina og raksturin av vegunum og tunlunum.

Tað er eigarin av tunlunum og eingin annar, sum avger støddina á teimum nýtslugjøldum, ið kravd verða frá teimum, ið nýta tunlarnar v.m. Landsstýrismaðurin hevur sostatt ikki heimild til áseting av støddini á nýtslugjøldunum. Hetta merkir eisini, at um ein veðhavari yvirtekur tunnilin, fær hann henda rætt. Sambært § 5, stk. 5 skal landsstýrismaðurin tó góðkenna støddina á nýtslugjøldunum, sum felagið sambært § 7, stk. 1. hevur heimild at áseta, um felagið ikki hevur javnvág á sínum rakstri.

Nýtslugjøldini skulu vera av eini stødd, sum ger, at felagið hevur ráð at afturgjalda rentur og avdráttir til lánistovnarnar, umframt at kunna gjalda rakstur og viðlíkahald av anlegginum. Eisini skulu nýtslugjøldini gera felagið ført fyri at konsolidera seg rímiliga væl.

Tá felagið enn ikki er farið í holt við prosjekteringina og heldur ikki hevur gjørt nakrar byggisáttmálar, er tað í dag ógjørligt at meta um, hvussu stór nýtslugjøldini verða, tí samlaði íløgukostnaðurin fer at avgera tað.



Avrit frá kvf.fo

**Til § 8**

Landsstýrismanninum verður heimilað móti fullum endurgjaldi at ognartaka neyðugt øki ella tilfar til at fremja verkætlanina, um so er, at tað ikki við samráðingum eydnast at finna eina semju við teir ymisku rættindahavararnar um yvirtøku av øki ella tilfari.

Eisini er ásett, at landsstýrið skal avhenda tað ognartikna til felagið fyri útveganarkostnað.

**Til § 9**

*Stk. 1.* Meðan byggiarbeiðið fer fram, verða umframt rentuútreiðslur eisini aðrar munandi útreiðslur, so sum forkanningar v.m., sum ikki kunnu dragast frá, tí tað verða ongar rakstrarinntøkur í byggitíðini.

Eftir galdandi skattalóg er heimild til at draga frá skattligt hall í skattligu inntøkuni tey fylgjandi 5 árini. Í hesum skeiði kann frádrátturin tó bert flytast til eitt seinni inntøkuár, rúmast tað ikki í skattskyldugu inntøkuni undanfarna ár.

Fyri at eingin ivi skal vera um, hvussu ein vega- og tunnilsgerð í avskrivingarligum høpi er at meta eftir galdandi skattalóg, verður skotið upp, at reglurnar um vinnuligar bygningar verða nýttar, soleiðis sum tað eisini varð gjørt í sambandi við Norðoyatunnilin. Mest nærliggjandi er at sammeta tunnilin við vinnuligan bygning, og tí er hetta skilað til í lógini.

*Stk. 2.* Lýst verður, hvussu útveganarkostnaðurin skal skiljast.

**Til § 10**

*Stk. 1.* Staðfest verður, at tunlarnir eru ikki partar av landsvegakervinum. Hetta merkir, at tað ikki er vegamyndugleikin, men tunnilseigarin, sum er vegamyndugleiki við teimum fíggjarligu og øðrum skyldum, sum áliggja einum vegamyndugleika.

*Stk. 2.* Sjálvt um vegamyndugleikin er hjá tunnilseigaranum, hevur landsstýrismaðurin uttan mun til hetta tær heimildir, sum landsvegalógin og ferðslulógin geva honum.

*Stk. 3.* Tað verður nágreinað, at skipan av ferðsluni í tunlunum fer fram eftir somu reglum og leiðreglum sum fyri landsvegir.

*Stk. 4.* Felagið kann ikki verða kravt at gjalda fyri íbinding til landsvegin.

*Stk. 5.* Tað áliggur felagnum at gera og rinda útreiðslur í sambandi við møguliga umskipan av landsvegnum. Hetta merkir, at felagið eisini fyri egna rokning skal fáa í lag, at møgulig óbrúkt vegastrekkir verða frágingin soleiðis, at tey ikki misprýða náttúruna. Harafturat verður nágreinað, at um eitt íbindingaranlegg trívur inn í ein verandi landsveg, skal íbindingaranleggið, tá arbeiðið er liðugt, verða partur av tí samanhangandi landsvegakervinum, sum landsstýrið eigur.



Avrit frá kvf.fo

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

**Til § 11**

*Stk. 1.* Linjuføringin er ikki endaliga ásett viðvíkjandi Eysturoyartunlinum. Hetta kemst av, at tað skulu gerast fleiri kanningar, sum verða roknaðar sum týdningarmiklar fyri avgerðina um endaligu linjuføringina. Ásett verður tó, at linjuføringin verður norðan fyri Tórshavn við rundkoyring, har annar armurin kemur upp í Runavík og hin á Strondum.

*Stk. 2.* Linjuføringin er ikki endaliga ásett viðvíkjandi Sandoyartunlinum. Hetta kemst av, at tað skulu gerast fleiri kanningar, sum verða roknaðar sum týdningarmiklar fyri avgerðina um endaligu linjuføringina. Ásett verður tó, at linjuføringin verður millum Gomlurætt og Traðadal sambært tilmæli frá Landsverk.

**Til § 12**

Ásett verður, at felagið hevur rætt til uttan kostnað at fáa upplýsingar frá bilaskránni um eigarar/brúkarar av bilum, við tí endamáli at kunna krevja og ansa eftir, at hesir gjalda fyri at brúka tunnilin.

**Til § 13**

Ásetir gildiskomuna.

Fíggjarmálaráðið, 18. desembur 2013

Jørgen Niclasen,
Landsstýrismaður

/Bjarni Askham Bjarnason

Hjáløgd skjøl:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Sandoyartunnilin | Kort yvir linjuføring | Landsverk hevur teknað | 01.06.2007 |
| 2. | Eysturoyartunnilin | Kort yvir linjuføring | Landsverk hevur teknað | 01.04.2012 |
| 3. | Eysturoyartunnilin | Meting av eldvanda | SINTEF hevur skrivað | 15.01.2007 |
| 4. | Eysturoyartunnilin | Avleiddar verkætlanir | Upprit frá Landsverk | 03.01.2006 |
| 5. | Eysturoyartunnilin | Kostnyttukanning | Landsverk/VMR skrivað | 09.03.2006 |
| 5a. | Eysturoyartunnilin | Dagførd Kostnytta | Kostnytta frá Sund & Bælt | 01.09.2013 |
| 6. | Sandoyartunnilin | Kostnyttukanning | Landsverk/VMR skrivað | 09.03.2006 |
| 7. | Sandoyartunnilin | Notat um forkanningar | Landsverk skrivað | 19.11.2012 |
| 8. | Sandoyartunnilin | Notat um møg. loysnir | Landsverk skrivað | 15.07.2013 |
| 9. | Eysturoyartunnilin | Meting vandagreining | Rambøll skrivað fyri IMR | 01.02.2010 |
| 10. | Eysturoyartunnilin | Risikoanalyser | Rambøll skrivað fyri IMR | 01.04.2010 |
| 11. | Eysturoyartunnilin | Trafikberegninger | Rambøll skrivað fyri LV | 01.12.2012 |
| 12. | Eysturoyartunnilin | P1 Tilmæli um leist | Embætismannabólkur | 09.09.2013 |
| 13. | Eysturoyartunnilin | P2 Tilmæli um leist | Embætismannabólkur | 18.09.2013 |
| 14. | Báðir tunlarnir | Upprit um fígging | FMR skrivað | 18.12.2013 |

Avrit frá kvf.fo